áskoðarunum dámdu tað. Áskoðararnir flippaðu totalt út saman við sveittandi tónleikarunum. Hvar Mikkjal fær alla orkuna frá er ikki gott at vita, og tó hann stýrdi áskoðararnum, kundi hann ikki stýra ljóðinum, ið tíanverri als ikki livdi upp til framførsluna. Manningin í Sic spælir væl, men ljóði úteftir var so vánaligt, at tað var trupult at skilja ljóðførini frá hvørjum øðrum og trupult at hoyra hvat teir í heila tikið spældu. “Hasin monotorurin er deyður” brølaði Mikkjal undir framførsluni, og tað má eisini sigast um ljóðið úteftir - tað var ikki nóg hart frá.



## Stórt smíl

Munurin á ljóðmyndini hjá Sic og næsta bólkinum Lama Sea var sum dagur og nátt. Við teirra glaða tónleiki og smittandi spæligleði var framførslan hjá Lama Sea væleydnað. Teir eru lívligir á pallinum og løgini avbera góð. Serliga franska lagið “Demanche” var einastandandi, nakað av tí besta teir hava gjørt. Blásararnir vóru tvífaldaðir til framførsluna. Afturat Tróndi Olsen á trompet, høvdu Lama Sea fingið hjálp frá dugnaliga trom-



boneleikaranum Dáva Juul Magnussen. Í franska sanginum hoyrdist blásararnir útmerkað, men í restina av sangunum hoyrdist ikki nógv til teir.

Forsangarin Janus Rasmussen er eitt eindømi í Føroyskum tónleiki. Framførslan hjá honum er egin og hevur eina sjarmu og útstráling sum smittar av á áskoðararnar. Eisini restin av manningini hevur eina góða útstráling, serliga smittandi at síggja Jón Klæmint Hoffgaard spæla eyðkendu gittarsoloir við einum stórum smíli. Seinasta lagið minti ikki sørt um stílin hjá Guns N’ Roses. Ikki minst røddin hjá Janus Rasmussen hevði nakað av Axl Rose yvir sær - altíð gott at blíva mintur á, at 80’ini eisini høvdu sínar stóru hetjur.

Samanspælið kann gerast enn betur, og tað verður tað uttan iva. Bara síðani Prix Føroyar eru hend stór framstig. Lama Sea er ein av Føroya absolutt mest spennandi bólkum. Klokkan var tíanverri vorðin so nógv, at framførslan hjá Lama Sea bleiv stytt, til stórt forargilsi fyri áskoðarafjøldina og undirritaða.

## Fúlir og fittir

Seinasta framførslan var við PállFinnurPáll, og teir vóru samstundis høvuðsnavnið á konsertini. Tað vóru ikki tey stóru yvirraskilsini í framførsluni. Fúlar sangir um abbar, gubbar, bøssar og blottarar, og fittir sangir um kærleika. Áðrenn teir fóru á pall, byrjaðu áskoðararnir at troka seg fram móti pallinum, og so gott sum allir áskoðararnir vóru savnaðir, tá PállFinnurPáll byrjaðu at spæla.

Áskoðararnir vóru við frá fyrsta tóna. Teir sungu við til bæði tað fúla og tað fitta. Gentur og dreingir dansaðu stillisliga til grova sangin “Lær at siga nei” og sungu inniliga um at steikja heilan hjá grannanum á eini pannu. Hetta er orðatilfar sum ikki er borðbart í loftmiðlunum, men á konsertum har nógv ung eru savnað, vísir tað seg at sangirnir hava ein heilt serligan eginleika. Sangirnir geva áskoðarunum eina kenslu av samanhaldi. Tey ungu kenna sangirnar, og saman syngja tey um alt tað tey ikki mugu lurta eftir.

Ótrúligt at hugsa sær, at sangirnir eru vorðnir fólkaogn aftaná allar tær hvøssu atfinningarnar, sum tekstirnir fingu frá ummælarum og øðrum í byrjanini. Í dag stendur PállFinnurPáll sum ein tann størsti bólkurin í Føroyum. Hvør skuldi trúð tí, tá Páll Oddur og Finnur stoltir sungu sínar fúlu sangir fyri áskoðarum, sum í fleiri førum rýmdu mitt undir konsertunum, tí tekstirnir vóru ov ónærisligir og fúlir, ella kanska bara erligir og beinraknir.

## Bólkar við framtíð

Bólkurin hevur trumlað fleiri tabuir, og leikur steðgar ikki her. Teir halda á fram við at boða teirra boðskap um misbrúkt børn og kærleika, tí tað er alt ein partur av veruleikanum. Nýggjárskonsertin 2005 gjørdist ein slóðbrótandi konsert, har ungu evnaríku bólkarnir av røttum fingu rásarúm. Hesir bólkar og aðrir við hava visiónirnar og evnini til at menna føroyskan tónleik framyvir – hettar er ein gong leið.

